Pól frammanfyri HB-spælarar

Fleiri HB-spælarar fingu atkvøður í valinum av ársins spælara hjá monnum, men tað gjørdist ein B36'ari, sum fór við heiðrinum hesaferð. Toppskjúttarnir vóru úr Klaksvík, og B68 átti bæði stjørnuskotini

Fótbóltsárið endaði við afturvendandi gallaveitsluni, har leikarar úr ymsum feløgum vórðu heiðrað fyri síni avrik gjøgnum árið

ÁRSINS
Jákup Mørk
jakup@sosialurin.fo

Leygarkvøldið var árliga gallaveistlan fyri fótbóltsspælarar hildin í Mentanarhúsinum í Fuglafirði.

Umframt veitslulag og hugna var eisini avdúkað, hvørjir ársins spælarar í fótbóltskappingini í summar vóru. Tað vóru liðskipararnir á landsins fótbóltsliðum, sum saman við fjølmiðlunum tóku saman um árið við eini atkvøðugreiðslu.

Ársins spælarar hjá monnum og kvinnum gjørdust ávíkavist Pól Thorsteinsson úr B36 og Rannvá Andreassen úr KÍ. Tað var lítil og eingin ivi um ársins spælara hjá kvinnum, men tað kom kanska eitt lítið sindur óvæntað á, at ein B36'ari skuldi fara við heiðrinum hjá monnum.

Fleiri HB-spælarar fingu atkvøður í atkvøðugreiðsluni, og tí kundi hvørki Rógvi Jacobsen, Rúni Nolsøe ella Jan Dam prýða seg við heitinum. Pól Thorsteinsson hevur verið týdningarmikil í verjuni hjá B36 í ár, og hann varð kosin sum ársins spælari.

Lækni hugleiddi

Umboð fyri øll feløgini vóru til gallakvøldið í Fuglafirði, og Heri Jacobsen, sum tey flestu kenna sum øran vert í Barometrinum hjá Útvarpinum, var toastmastari. Hann royndi at fáa gott lag á veitslufólki, og tað var eingin ómøguliga uppgáva.

Nógvar varð sungið og prátað, og tað vóru ongar gamlar takklingar ella samanbrestir havdir á lofti hetta kvøldið.

Ein gestaroðari at vera við til gallakvøldið, og hesaferð var tað Andrias Petersen, lækni og løgtingslimur, sum hugleiddi um fótbólt. Hann hevur verið lækni hjá GÍ í mong ár og hevur verið á nógvum fótbóltsferðum saman við gøtumonnum.

Dani varð ársins venjari

Umframt ársins spælari vóru eisini aðrir spælarar heiðraðir. Ársins málverjar gjørdust Alber Sævarsson hjá B68 og Randi Wardum hjá HB. Albert er íslendingur og hevur verið partur av kanska landsins bestu verju í summar. Randi Wardum er landsliðsmálverji og burturúr besti málverji hjá kvinnum.

Ársins venjarar gjørdust teir báðir meistaravenjararnir Frank Skytte og Jón Harald Poulsen.

Danin Frank Skytte gjørdi annað árið á rað HB til meistarar, og hóast hann gevst sum venjari í HB, kann hann fegnast um, at hann fekk hendan heiður við sær til Danmarkar.

Jón Harald Poulsen hevur verið venjari hjá KÍ-kvinnunum í nógv ár, og aftur í ár vunnu klaksvíkskvinnur alt, sum vinnast kundi.

Stjørnuskot úr B68

B68 átti bæði stjørnuskotini í ár. Hjá kvinnum var Mary-Ann Isaksen ársins stjørnuskot, og hjá monnum varð Jann Ingi Petersen valdur.

Jan Ingi var einki óvæntað val, hóast Atli Danielsen úr KÍ og Tór-Ingar Akselsen úr HB eisini fingu fleiri atkvøður.

Jann Ingi hevur í ár verið sentralur á B68-miðvøllinum, hann hevur spælt seg inn í landsliðshitan, og hann hevu fingið sáttmála við danskt felag. Eitt gott ár hjá honum

Umframt ársins spælarar vóru gyltu stivlarnir eisini handaðir toppskjúttunum hjá kvinnum og monnum, og her fóru klaksvíkingar við øllum. Hjalgrím Elttør og Rannvá Andreassen kundu taka hvør sín gullskógv við sær heim um Leirvíksfjørð sunnunáttina.

Ársins spælarar 2003

Ársins spælari, menn
Pól Thorsteinsson, B36

Ársins spælari, kvinnur
Rannvá Andreasen, KÍ

Ársins málverji, kvinnur
Randi Wardum, HB

Ársins málverji, menn
Albert Sævarsson, B68

Ársins venjari, kvinnur
Jón Harald Poulsen, KÍ

Ársins venjari, menn
Frank Skytte, HB

Ársins stjørnuskot, kvinnur
Mary-Ann Isaksen, B68

Ársins stjørnuskot, menn
Jann Ingi Petersen, B68

Toppskjútti, kvinnur
Rannvá Andreasen, KÍ 49 mál
Malena Josephsen, KÍ, 37 mál
Halltóra Joensen, HB 29 mál

Topskjútti, menn
Hjalgrím Elttør, KÍ 13 mál
John Petersen, B36 10 mál
Andrew av Fløtum, HB 10 mál

StÍF-VÍF 22-32 (9-18):

Ferð á VÍF

Eftir heldur trilvandi byrjan tykist VÍF nú av álvara hava sett ferð á

HONDBÓLTUR
Jákup Mørk
jakup@sosialurin.fo

Vestmanna kvinnurnar fingu ikki ta byrjan upp á kappingarárið, sum tær høvdu ætlað, tá tær í næsta umfarinum fingu rætt og slætt bank í Vági. Fyri summi var hetta kanska ein ábending um, at VB aftur í ár fór at verða einaráðandi, men nú tykjast ábendingar tó vera um, at VÍF ikki verða so lættar at syfta kortini.

Fyrst og fremst er orsøkin kanska, at liðið nú hevur fingið útlendska styrkin til landið, men hartil tykist restina av liðnum eisini hava funnið rætta fótafestið. Og ikki minst, so er rætti viljin eisini um at koma fram á liðnum.

Styrkin skal mátast

Sunnudagin vitjaði VÍF á Skála, og har var sjáldan ivi um, hvønn veg tað skuldi fara.

Serliga í verjupartinum stóðu gestirnir seg væl, og ferð eftir ferð gav hetta úrslit í kvikum kontra-álopum, sum StÍF málverjin millum lítið og einki kundi gera fyri at steðga.

Verður so lagt afturat, at Ioana Rápa enn tykist nærkast gamla stilinum alt meira, so er einki at siga til, at StÍF mátti boyggja seg. Tó at liðið telir tvær av heilt góðu skjúttunum millum tær útlendsku, so megnaðu hesar sjáldan at skræða vælvirkandi VÍF verjuna sundur, og í aðrar mátar tykist liðið hjá StÍF ov tunt til veruliga at gera seg galdandi. Í øllum førum enn, men við framhaldandi menning av arbeiðinum, sum í fjør førdi liðið til bronsuna, so skuldi hetta tó ikki verið heilt ógjørligt um eini tvey ár.

Men í ár verður tað so neyvan. Her tykist tað fyrst og fremst verða VÍF, sum skal kappast við VB um oddin. Enn er Neistin eisini við í hesum stríði, og júst tær koma á vitjan í Vestmanna komandi vikuskifti, so tá fæst kanska ein enn betri hylling á, hvør styrkin hjá VÍF-kvinnunum er.

Serliga riggaði verjuparturin hjá VÍF væl, og ikki so sjáldan gav hetta úrslit í kvikum kontra-álopum

Mynd: Álvur Haraldsen

Dysturin í tølum

StÍF-VÍF 22-32 (9-18)
Málskjúttar
StÍF: Melica Ergic 6(1), Alina Olaru 6(4), Beinta Joensen 4, Poula D. Olsen 3, Anna Maria Berthelsen 2, Paula B. Høgnesen 1
VÍF: Nikolina Eyðbjørnsdóttir 10, Ioana Rápa 9(3), Sóley Mikkelsen 7, Irina Radovici 3, Fríða Marjundardóttir 2, Eydna Joensen 1
Brotskøst: StÍF 6, VÍF 5
Útvísingar: StÍF 1
Dómarar úr Neistanum: Kristian Johansen & Sámal Hansen.

Neistin-H71 32-22 (14-13):

Neistin vann sannførandi á H71

Aldursforsetin helt fast um oddasessin, tá hoyvíkingar vitjaðu. Veruligur spenningur var sjáldan um úrslitið

HONDBÓLTUR
Hermann Mortensen

Tá Neistin og H71 brustu saman sunnudagin, var talan um topp ímóti botnið. Neistin hevði undan dystinum trý stig, meðan H71 enn ikki er komið á stigartalvuna.

Væl av fólki høvdu leitað sær niðan í høllina á Hálsi sunnudagin, tá ið Neistin og H71 møttist í triðja leikumfari. Hóast talan var um topp ímóti botnið, so sást tað ikki á dystinum fyrrenn miðjan seinna hálvleik, tá neistamenn gjørdu bart og struku avstað, og harvið vunnu sera sannførandi tá ið samanumkom. Menn vóru sera uppsettir, erpaðu sær av hvørjum máli og lagið var gott bæði á og uttanfyri vøllin.

Liðini vóru sera jøvn ígjøgnum allan fyrra hálvleik, tey skiftust um at hava leiðsluna, og tá ið farið var til hálvleiks, vóru neistamenn á odda við einum máli. Fyrri hálvleikur var ferðmikil, og væl leiktur við nógvum góðum kombinatiónsspæli frá báðum liðum. Hjá Neistanum var tað serliga Dragisa Stojovic og Blagoje Buha sum royndist sera væl. Meðan fyri H71 vóru tað Halgir D. Olesen og leikandi venjarin Henrik Gester, ið stóðu fyri at gera tey flestu málini.

Hoyvíkingar royndu at muta ímóti, men teir fingu tó ikki gjørt tað heilt stóra við Neistan

savnsmynd

Hvat neistamenn hava tosað um í hálvleikinum veit eg ikki, men teir løgdu væl út, og tað var ikki long tíð gingin áðrenn teir høvdu vunnið sær eina greiða yvirvág, sum H71 ikki megnaði at hála inn aftur. Tað er eisini vert at nevna at H71, ikki skoraði nakað mál í útvið eitt korter í seinna hálvleiki. Ikki tí møguleikarnir ikki vóru til tað, men tí verjan hjá Neistanum stóð væl, og tað sum hon ikki tók, tað tók Zeljko Jotic í málinum. Hann leikti ein sera góðan dyst í málinum, og við sínum nógvu bjargingum tók hann fullkomuliga pippið frá nøkrum av H71 leikarunum. Neistamenn harafturímóti spældu góðan álopshondbólt, og komu til nógvar royndir, sum teir megnaðu at umseta til mál í flestu førðum. Endaliga støðan gjørdist at Neistin vann 32-22 ímóti H71

Breiðari hóp.

At neistamenn hava eitt gott lið er einki at ivast í. Tað vístu teir við at vinna í Vestmanna og so aftur sunnudagin sera sannførandi ímóti H71. Neistin hevur ein breiðari hóp enn H71, og tað kom tíðuliga til sjóndar í dystinum. Neistin hevur fleiri ið gera málini, eitt nú er Dragoisa Stojovic ein sera góður skjúttið og sunnudagin skoraði hann níggju mál. Men tað eru eisini aðrir, ið kunnu taka ábyrgdina á seg, eitt nú Blagoje Buha og Áki Mørk. Neistin kundi gera nógvar útskiftingar so skjúttarnir fingu hvíld, uttan at tað darvaði spælinum.

H71 spældi so at siga við somu monnum at kalla allan dystin, og tað sást serliga í seinna hálvleiki, tá ið kreftirnar byrjaðu at ganga undan. Henrik Gester og Halgir D. Olesen eru framúr góðir leikarir, men teir megna ikki at bera liðið ein heilan dyst. Henrik Gester byrjaði við at spæla bæði álop og verja, men í seinna hálvleiki var hann fyri tað mesta bara í álopinum, tað kann sjálvandi vera orsaka av at hann hevði tvær útvísingar hangandi yvir høvdinum á sær, og tí var í vanda fyri at bliva burturvístur.

Eftir dystin sunnudagin stendur tað greitt, at Neistin varðveitir oddasessin í bestu mansdeildini, saman við grannanum Kyndli, og at H71 enn er niðast við ongun stigi. Komandi dyst skal Neistin taka ímóti KÍF á Hálsi, meðan H71 á heimavølli skal takast við meistararnar úr StÍF.

Dysturin í tølum

Neistin-H71 32-22 (14-13)
Málskjúttar
Neistin: Dragisa Stojovic 9, Blagoje Buha 8(1), Áki Mørk 5, Ári Rouch 2, Birgir Kass 2, Helgi Justinussen 2, Dann Thorleifsson 1, Karl Oddmar Rasmussen 1, Helgi Michelsen 1
H71: Halgir Dahl Olesen 6(2), Henrik Gerster 5(1), Niels Viggo Niclasen 4, Jákup á Borg 2, Heini Bendtsen 2, Johnny Durhuus 1, Olaf Vestergaard 1, Esbern Patursson 1
Brotskøst: Neistin 2, H71 5
Útvísingar: Neistin 4, H71 5
Dómarar úr Kyndli: Hannis Wardum & Uni Wardum

Neistin-Søljan 29-18 (13-12):

Neistin basti Søljuni

Tað gekk sum væntað, tá Søljan vitjaði Neistan, men leingi fylgdu gestirnir væl við, og ikki fyrr enn Neistin fór at mansverja Nicoletu Radu, skrædnaði millum partarnar

HONDBÓLTUR
Hermann Mortensen

Í høllini á Hálsi vann Neistin ímóti Søljuni. Dystur varð ikki væl leiktur og var merktur av lítlari ferð og nógvum persónligum feilum.

Neistakvinnurnar hava við sigrinum á Søljuni fingið góða byrjan uppá kappingina. Tveir sigrar og ein taptan dyst er tað blivið til higartil hjá Neistanum, meðan Søljan enn hevur fyrstu stigini tilgóðar.

Tað var tó lítið sum bendi á, at Neistin skuldi vinna ein so ruddiligan sigur. Liðini fylgdust rættuliga væl ígjøgnum allan fyrra hálvleik og stóran part av seinna hálvleiki. Neistin var tó leikliga omaná alla tíðina, men neistakvinnur megnaðu sera illa at umseta allar teir upplagdu málmøguleikarnar til mál, annahvørt vóru tær ikki nóg neyvar ella var tað tí, at ein sera væl leikandi Kristina Grikaite stóð í málinum hjá Søljuni.

Mansverja hjálpti

Í fyrra hálvleiki royndu neistakvinnurnar at seta ferðina upp, men tað gekk ikki tí tær gjørdu alt ov nógvar feilir. Tað gjørdi heldur ikki støðuna betri, tá Lina Andriulyte mátti fara av vøllinum við einum skaddum fingri.

Søljan var við allan fyrra hálvleik og tær fingu eisini pláss at spæla. Serliga Nicoleta Radu gjørdi um seg, hon saman við Heidi Akselsen og Arnleyg Haraldsen stóðu fyri øllum álopsspælinum hjá Søljuni. Tá farið var til hálvleiks var Neistin á odda 13 - 12.

Í byrjanini av seinna hálvleiki gekk spælið báðar vegir, og ta einu løtuna var støðan 16-16, men so var tað sum at Neistin tendraði. Tær settu Ásu á Neystabø at mansverja Nicoletu Radu, og so var sera truplut, fyri ikki at siga ógjørligt hjá Søljuni at fáa mál. Nú st?rdi Neistin fullkomiliga dystinum, og tær gjørdu sum teimum lysti. Tá ið dysturin var liðugur, hevði Neistin vunnið við ellivu málum so endaliga støðan gjørdist 29 - 18.

Fyri Neistan var hetta ein dystur sum skuldi vinnast, um tær ætla at vera við tá heiðursmerkini skulu b?tast einaferð í vár, harafturat skulu tær vísa betri spæl enn tær gjørdu sunnudagin ímóti Søljuni. Hjá Søljuni verður helst talan um eitt botnstríð hetta kappingarárið, hópurin er sera smalur, og so at siga alt álopsspæli hvílur á herðunum á Nicoletu Radu.

Komandi vikuskiftið skulu neistakvinnur til Vestmanna at leika ímóti VÍF, meðan Søljan skal royna seg á Giljanesi, har StÍF kemur á vitjan.

Dysturin í tølum

Neistin-Søljan 29-18 (13-12)
Málskjúttar
Neistin: Simona Dziugyte 7(2), Lív Sørensen 4, Ása á Neystabø 4, Rakul Augustinusen 4, Marjun Tróndarson 3, Jórun Ludvig 3, Vivian Unadóttir 2, Lina Andrialyte, Unn Kragesteen 1
Søljan: Nicoleta Radu 9, Heidi Maria Akselsen 4, Arnleyg Haraldsen 3, Jana Jacobsen 1, Petera Thomassen 1
Brotskøst: Neistin 3, Søljan 1
Útvísingar: Neistin 5, Søljan 3
Dómarar úr Kyndli: Hannis Wardum & Uni Wardum